





# Aðalfundur í Fiskavirking útsettur – snøklar mangla

**FISKAVIRKING**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Aðalfundurin, sum skuldi vera í Fiskavirking síðst í farnu viku, varð útsettur. Stjórin í Fiskavirking, Meinhard Jacobsen sigur, at tað eru bert snøklar, ið mangla at fáa uppá pláss. –Tað eru smáting, sum skulu fáast uppá pláss aftrat, og eg rokni við, at aðalfundurin verður í næstum. Hann roknar tó neyvan við, at tað verður í vikuni, sum kemur. Richard Mortensen, nevndarformaður, sum Sosialurin hitti á Vestaru Bryggju leygarmorgunin, tá Falkur og Heykur komu til kei eftir samanstoyt á fiskileið, er fámæltur. Hann váttar tó, at talan er um at fáa snøklar uppá pláss. –Vit eru um at hava eina loysn á trupulleikunum, sum hava rakt felagið, klárað. sigur hann.




*Richard Mortensen, nevndarformaður og Meinhard Jacobsen, stjóri í Fiskavirking siga, at tað eru bert snøklar, sum mangla at fáa uppá pláss til aðalfundin, sum helst verður í komandi viku*
*Mynd Jan Müller*

# Óluvá skal gera krabbameinsætlan fyri Føroyar

**Eftir áheitan frá Føroya Felag móti Krabbameini og eftir tilmæli í "Álit um framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum", hevur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sett ávikavist ein stýrisbólk og ein arbeiðsbólk at gera eina krabbameinsætlan fyri Føroyar. Eisini er samskipari settur, ið burturav kemur at arbeiða við krabbameinsætlanini, sum skal handast landsstýrismanninum 1. juli 2009**

**KRABBAMEIN**
*Tíðindaskriv*

Óluva Zachariassen er sett sum samskipari og skrivari fyri verkætlanini frá 1. september 2008 til 30. juni 2009, har hon burturav kemur at taka sær av at arbeiða við krabbameinsætlanini. Óluva Zachariassen stavast í dag í Kringvarp Føroya.

Krabbameinsætlanin skal í høvuðsheitum lýsa, hvussu fyribyrging, diagnostikkur, kanning, viðgerð, rehabilitering og tann palliativi (linnandi) innsatsurin skulu skipast.

Yvirskipaðu rættindini hjá sjúklingunum í viðgerðargongdini, eins og skyldan hjá heilsuverkinum at veita ta áløgdu tænastuna sambært tí yvirskipaðu krabbameinsætlanini, skal við hesum gerast meira týðilig.

Í Stýris- og arbeiðsbólkinum, ið Hans Pauli Strøm hevur sett, eru:

### Stýrisbólkur:

Poul Geert Hansen, aðalstjóri í Almanna- og heilsumálaráðnum.

Tummas í Garði, læknastjóri á Landssjúkrahúsinum

Jákup N. Olsen, formaður í Føroya Felag móti Krabbameini

### Arbeiðsbólkur:

Óluva Zachariassen, samskipari frá Almanna- og heilsumálaráðnum

Bjarni á Steig, yvirlækni / møguliga í skifti við krabbameinslækni í konsulentskipanini frá Universitetssjúkrahúsinum í Lund

Maria Debess, sjúkrarøktarfrøðingur frá Onkologiska Ambulatoriunum

Katrina L. Joensen, sálarfrøðingur og knýtt at palliativa toyminum

Jansy Gaardlykke, dagligur leigari hjá Føroya Felag móti Krabbameini

Ein breitt umboðandi tilvísingarbólkur verður eisini settur í næstum. Uppgávan hjá tilvísingarbólkinum er at koma við viðmerkingum og geva "feed back" upp á tað arbeiðið, ið arbeiðsbólkurin ger.

Krabbameinsætlanin skal handast landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum í seinasta lagi 1. juli 2009.